

# Brúka peruna

## Sp/f ETP Consult søkir eftir Elverkfrøðingi, elinnleggjara ella maskinmeistara

**Um starvið**
Tú verður við til at byggja deild okkara í Hoyvík upp frá byrjan og fert at starvast bæði í Føroyum og uttanlands. Í starvinum skalt tú millum annað:

- Prosjektera
- Hava eftirlit við verkætlanum
- Samskifta við kundar, bæði í skrift og talu
- Samstarva við deild okkara í Herning

**Um teg**
Tú hevur prógv sum elverkfrøðingur, elinnleggjari ella maskinmeistari og hevur áður starvast sum elektrikari ella tílíkt. Hevur tú royndir at prosjektera, er tað fyrimunur.

Tað er týdningarmikið, at tú ert ágrýtin, arbeiðir sjálvstøðugt og dugir væl at samstarva. Vit vænta eisini, at tú ert álítandi og megnar at halda tíðarfreistir.

Í skrift og talu skalt tú fyrst og fremst duga føroyskt og danskt væl. At duga enskt er ein fyrimunur, men ikki eitt krav.

**Um okkum**
Sp/f ETP Consult er undir stovnan sum dótturfelag hjá ETP Consult ApS í Herning. Í verandi løtu eru vit tríggir verkfrøðingar í fyritøkuni.

ETP Consult ApS eigur eisini saman við tveimum øðrum donskum verkfrøðingafyritøkum felagið CTC Group ApS, har vit arbeiða við heildarprosjektering.

Vit arbeiða í løtuni við verkætlanum í Grønlandi, Føroyum, Danmark og Turkalandi.

**Er hetta nakað fyri teg?**
Skriva til okkara og sig okkum, hví tú ert rætti persónurin til starvið. Send brævið til:

Sp/f ETP Consult
Gróthúsvegur 4, kj.
188 Hoyvík

Vilt tú vita meiri um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Eyðun S. Olsen á tlf. 35 43 21 ella (+45) 51 20 85 29. Vit vísa eisini til heimasíðu okkara: www.etpconsult.dk

Freistin at søkja er 1. februar 2007.

**Sp/f ETP Consult · Gróthúsvegur 4, kj. · FO-188 Hoyvík**
**Tlf. (+298) 35 43 21 ella (+45) 51 20 85 29 · www.etpconsult.dk**

ETP CONSULT APS
POWER OF KNOWLEDGE

REPROZ



ENDURLÝSING:

## Almannastovan søkir
# leiðara til økisdeildina í Tórshavn

Økisdeildin í Tórshavn er tann størsta av teim 4 økisdeildunum hjá Almannastovuni. Á deildini starvast 16 fólk. Deildin umfatar Streymoy, Vágar, Sandoy og smáu oyggjarnar í miðøkinum. Økisdeildirnar hava til uppgávu at veita sosiala ráðgeving og vegleiðing til einstaklingar, upplýsa um rættindi, skyldur og hjálparmøguleikar sambært almannalóggávuni, viðgera umsóknir um veitingar og hjálparfyriskipanir og umsita veitingar sambært forsorgarlógini og tørvstreytaðar veitingar sambært pensjónslógini og annars móttaka og veita møguligan stuðul í sambandi við umsókn um aðrar almannaveitingar, sum deildin ikki sjálv umsitur.
Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygd og virðing fyri einstaklinginum. Virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

Vit sóknast eftir einum persóni við hóskandi útbúgving, t.d. sosialráðgeva- ella líknandi útbúgving, samfelagsfrøðiligari útbúgving frá hægri lærustovni ella líknandi, sum hevur hug at royna eitt spennandi, fjølbroytt og avbjóðandi starv sum leiðari á økisdeildini í Tórshavn.

Umsøkjarar við leiðsluroyndum, kunnleika til almannalóggávuna og almenna fyrisiting hava fyrimun.

Okkara ynski eru, at tú hevur evni at seta í verk fyriskipanir, evni at eggja og menna starvsfólk, góð samstarvsevni, góð evni at orða teg skrivliga sum munnliga og kunnleika til EDV á brúkarastøði.

Í starvinum sum leiðari verður tú partur av einum fjølbroyttum og livandi tvørfakligum umhvørvi, har samstarvað verður nógv við aðrar deildir og stovnar og møguleikar eru fyri at at ávirka og menna almannatænastuna. Tú verður partur av einum stovni, sum alla tíðina má tillaga seg broytingar í samfelagnum og taka við avbjóðingum, sum liggja í tíðini og framtíðini.

Leiðarin hevur ábyrgdina av leiðslu, ráðlegging og samskipan av økisdeildini. Hann hevur ábyrgd av, at deildin er í støðugari menning, at starvsfólk trívast og mennast, at arbeiðið er skipað soleiðis, at tænastan er tillagað tørvinum hjá brúkaranum og broytingum í treytunum hjá stovninum og at samskiftið millum deildir og fakbólkar á stovninum støðugt mennist.

Starvið er sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á tel 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 8. januar 2007, kl. 12.

Vinarliga merkið brævbjálvan: "økisdeildarleiðari" og send umsóknina til Almannastovuna, Smyrilsvegur 20, Postboks 3096, 110 Tórshavn.

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80